# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Theodor Olsen prestur í Kvívík

Frá 1. januar til 31. mars 2008 røkir Theodor E. D. Olsen starvið sum sóknarprestur í Norðstreymoyar prestagjaldi við sæti í Kvívík. Hann avloysir Marjuna Bæk, sum fer í lestrarfarloyvi hesa tíðina.

Theodor, sum er úr Hoyvík, er gudfrøðingur frá universitetinum í Keypmannahavn og hevur gingið á pastoralseminarium í heyst.

Hann verður prestvígdur og innsettur í Kvívíkar kirkju sunnudagin 6. januar.



*Theodor E. D. Olsen avloysir Marjuna Bæk, sum fer í lestrarfarloyvi*

## Minningarorð um pápa mín

# Páll Sandá, Vágur

**Føddur 11. desember 1941- deyður 12. august 2007**



Við hesum fáu orðum vil eg royna at lýsa seinastu tíðina, ið eg upplivdi saman við pápa mínum. Tað eru longu 4 mánaðir síðani pabba dróg andan fyri seinastu ferð. Tung var løtan, ímeðan vit sótu hjá honum seinastu dagarnar í lívi hansara. Men tað er eisini tungt at siga, at lættin var, hóast alt, eisini stórur, tá pabba doyði, tí hann hevði sanniliga havt eitt satt stríð seinasta árið, ið hann livdi.

Tað var við stórari sorg, at eg móttók boðini um, at pabba hevði fingið deyðiligu sjúkuna heilakrabbi. Ongin vón var fyri at fáa hann frískan aftur. Spakuliga gekk við viðgerð, ið skuldi leingja pabbasa lív. Hóast vónin var lítil um, at pabba fór at gerðast frískur aftur, livdi hann sína seinastu tíð, sum um onki var galið. Hann var, sum altíð, raskur og glaður, og var altíð klárur at hjálpa, har hann kundi. Men hann varð skjótt merktur av sjúkuni, gloymdi illa orð og ting. Tá beinini fóru at bila, og hann ikki kundi ganga meira, fekk hann tíðina at ganga við at lurta eftir søgum, hyggja at fótbólti og øðrum. Honum dámdi væl at fáa vitjan, og komu nógv fólk á gátt hjá pabba og mammu, ímeðan hann var sjúkur. Hann hevði altíð eitt gott mót og royndi at venja, soleiðis at kroppurin ikki stívnaði.

Hóast hetta so endaði tað við, at pabba legðist í songina, lammaður og kundi ikki tosa. Men skilið misti hann ongantíð, so hann visti, hvønn veg tað bar. Tað er við tungum lyndi, at eg hugsi aftur á tað tíðina. Eg royndi at vitja hann so ofta, tað bar til, og tað eri eg sera takksom fyri, at eg gjørdi. Seinastu ferðina eg vitjaði hann, var hann uttan vit, og eg sat hjá honum, saman við mammu og systrunum, inntil hann dróg tann seinasta andan. Tað var sera tungt, men hóast alt so var hatta onki lív, ið ein kundi bjóðað nøkrum menniskja. At ein maður, sum alt sítt lív hevur verið so ótrúliga raskur til arbeiði, skuldi enda sínar dagar soleiðis, er heilt ófatiligt, ja óveruligt.

Børnini sakna abban. Tey vitjaðu hann ofta, ímeðan hann var sjúkur, og hart var hjá teimum at siga honum farval. Tey tosa ofta um hann. Pabba dámdi sera væl at vitja okkum her á Sandi, og vóru mamma og pabba ofta her, áðrenn pabba varð vorðin sjúkur. Minnini eftir abban eru nógv og góð. Tey minnast aftur á, tá abbin var og vitjaði okkum í slakti, tað var altíð so hugnaligt. Tað var næstan hátíðardagur, tá tey komu at vitja. Nú jólini eru í hondum, fara tankarnar ofta til pabba, tey spyrja nógv til hann og halda, at tað er keðiligt hjá ommuni, at hon skal halda jól uttan abban.

Við hesum fátøku orðum vil eg minnast pabba, sum hann var: ein góður pápi fyri meg og ein sera góður abbi fyri børn míni. Og vit sakna hann øll. Tómrúmið eftir hann fer altíð at verða her. Men vit ugga okkum við, at pabba hevur fingið frið og er komin til eitt betri stað, har hann er saman við Harranum í Himlinum. Og eg vóni, at mamma og systkyn míni eisini fáa troyst í hesum.

*Bert ein dag, eitt bil í senn eg fái,*
*ríka troyst til stirda sál og ond!*
*Hví nú stúra? Lít á Harrans náði,*
*alt jú hvílir í Guðs Faðirs hond.*
*Hann, sum alt mítt ber í faðirbarmi,*
*hvønn ein dag á fold mær senda vil*
*partin mín av frøi og av harmi,*
*sum eg júst man treingja til.*

**Anja**

†

**Jarðarferð**

**Marjun Lamain**
fødd Niclasen

fer til gravar úr Havnar Kirkju mikudagin tann 19. desember kl. 13.00

*Familjunnar vegna*
**Jona, Zacharias, Turid og Randi**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Borghild Signy Eliasen**
Fuglafjørður

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 16. des. 83 ára gomul.
Bønarhald verður í kapellinum mikudagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Siloa hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Arnfríð, Marita, Mona, Birita og Ólavur**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Ragnhild Poulsen**
Skipanes
ættað av Glyvrum

andaðist mánadagin 17. des.
Kistan fer úr heiminum hjá dóttrini í Fuglafirði mikukvøldið kl. 19.00 í Glyvra kirkju.
Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Dánial og Kára**

**Dagurin**
**19. desember. Nemesius**, deyður umleið ár 250. Um halga mannin Nemesius sigur halgisøgan, at hann einaferð varð lagdur undir stuldur. Men tá ið hann kundi prógva, at hann var ósekur, varð hann ákærdur fyri at vera kristin og tikin av døgum